## DAGSINS MEINING

### Ferðsludeyðin – ein fólkaheilsutrupulleiki

Komandi sunnudag verður á triða sinni hildin minningardagur teirra, ið deyð eru í ferðsluni í Føroyum. Síðani fyrstu ferðsluvanlukkuna, sum kravdi mannalív, í 1928, eru 240 fólk í Føroyum deyð í ferðsluni.

Seinastu tíggju árini eru 39 fólk deyð, og mett verður, at eini 1.000 fólk hava fingið skaða, harav eini 100 teirra hava fingið varðandi mein. Gjørt upp í pengum hevur hetta kostað føroyska samfelagnum hálvaaðru milliard krónur seinastu 10 árini

Hetta eru tey naknu hagtølini – afturlítandi. Venda vit teimum við, so kunnu vit staðfesta, at um tíggju ár fara umleið 40 fólk okkara millum at doyggja í ferðsluni. Vit vita ikki hvør okkara tað verður. Vit kunnu bara spyrja, um tað verður tú, um tað verði eg ella kanska onkur annar.

Vit kunnu eisini longu nú staðfesta, at næstu tíggju árini fara umleið 1.000 føroyingar at fáa skaða í ferðsluni. Eini 100 fara at fáa álvarsligt mein, sita í koyristóli restina av lívinum, ella kanska liggja í eini sjúkrasong á einum røktarheimi næstu 50 árini.

Vit mugu bara staðfesta, at ferðslan er hóttan móti vælferð okkara. Hetta er størsta lívshóttan, okkara ungdómur hevur, og kortini tykist, sum um vit lata standa til. Á hvørjum øðrum fólkaheilsuøki høvdu við bara latið stað til? Hví góðtaka vit, at so nógv fólk – aloftast ungfólk – á hvørjum ári skulu doyggja ella gerast álvarsliga sjúk av ferðsluvanlukkum?

Sviar hava altíð verið frammaliga á ferðslutrygdarøkinum, og eru tað t. d. sviar, ið vóru fyrstir við trygdarbeltinum. Í 1995 samtykti svenski ríkisdagurin 0-hugsjónina, sum í botn og grund snýr seg um, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Hetta meta sviar hevur gjørt sítt til, at svensku deyðshagtølini eru minkað seinnu árini.

Ferðsluumhvørvið skal tí eisni lagast eftir hesum setningi. Vit mugu alsamt betra um ferðsluumhvørvið, so at menniskjalig mistøk ikki enda við vanlukku, har onkur má lata lív ella koma álvarsliga til skaða.

Sambært Null-hugsjónini eru tað teir álvarsligu fólkaskaðarnir, sum skulu fáast burtur. Harvið verður ikki sagt, at tað ber til at sleppa undan øllum óhappum og øllum vanlukkum. Útgangsstøðið er, at tey mistøk, sum vit menniskju gera, og altíð koma at gera í ferðsluni, ikki skulu føra við sær, at onkur má lata lív ella koma álvarsliga til skaða.

Boðið til politikararnar eru tí greitt: Samtykkið ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk, sum er grundaður á Null-hugsjónina. Tað kann so verða stigið til at broyta ferðsluhugburð føroyinga.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

### Nýbygging og umhvørvisgóðkenning

Fjølmiðlarnir hava seinastu dagarnar verið upptiknir av gongdini av nýggjum goymslu- og smiðjubygningi hjá Tórshavnar Skipasmiðju á Vestaru Bryggju, har gamli »Fiskacentralurin« stóð. Málið er lagt út, sum um skipasmiðjan setir alla lóggávu um umhvørvisgóðkenning o.a. á økinum til viks og bara fer í gongd at byggja.



Fyri at rudda allan iva burtur og koma øllum illgrunasemi til lívs hesum viðvíkjandi, skal skipasmiðjan sum byggiharri við hesum greiða frá gongdini í málinum:

Tórshavnar Skipasmiðja keypti Sp/F Havnar Fiskacentralur, tá hesin gavst í áttatiárunum við tí fyri eyga, at hava møguleika fyri at byggja út, um tørvur og umstøðurnar annars vórðu fyri hesum í framtíðini.

Fyri nøkrum árum síðan varð ásannað, at tørvurin fyri nýggjum goymslu og smiðjubygningi var stórur, av tí at verandi hølisviðurskifti vóru ótíðarhóskandi og ikki nøktandi í mun til virksemi. Farið var tí undir at fyrireika bygging av nýggjum bygningi og at søkja um neyðug loyvi í hesum sambandi.

Umsókn um byggiloyvi var send Tórshavnar Kommunu tann 26. mars 2001. Eftir viðgerð í Byggi- og býarskipanarnevndini hjá kommununi fær skipasmiðjan tann 19. apríl 2001 byggiloyvi játtað frá kommununi, tó við teimum treytum,

- »at bygningurin ikki kemur inn á akbreytina, sum skal verða í minsta lagi 6 m. í breidd
- at garður verður gjørdur ímóti p-økinum vestan fyri Fiskavirking, soleiðis at eingin atgongd verður harífrá
- at umsøkjarin fær viðurskiftini við grannarnar uppá pláss í sambandi við uppatbygging
- at leiguavtala verður gjørd viðvíkjandi lendinum
- at viðmæli fæst frá havnarnevndini«

Eftir at skipasmiðjan hevur fingið byggiloyvi frá kommununi kemur nýggj kunngerð í gildi, sum m.a. setir krøv um góðkenning frá øðrum myndugleikum, áðrenn byggiloyvi kann verða givið. Hetta hevur tó onga ávirkan á byggiloyvið hjá skipasmiðjuni, sum var givið við støði í gomlu kunngerðini.

Skipasmiðjan er greið yvir, at nýggj kunngerð at komin í gildi, sum ásetir strangari krøv til vinnubygningar og ásannar samstundis, at ávíst arbeiði skal gerast á umhvørvisøkinum, áðrenn nýggi bygningurin kann takast í nýtslu. Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum er myndugleiki á umhvørvisøkinum, setir fram krøv um ikki bara eina umhvørvisgóðkenning av nýggja bygninginum, men eina fullkomna umhvørvislýsing av allari skipasmiðjuni, áðrenn nýggi bygningurin kann takast í nýtslu.

Tá endaliga byggiloyvi kemur frá Byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Kommunu tann 8. februar 2002 verður seinast í skrivinum undirstrikað, at »áðrenn bygningurin verður tikin í nýtslu, skal ein umhvørvisgóðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyriliggja«.

Givið er, at um skipasmiðjan skuldi gjørt alt hetta arbeiðið, áðrenn byggingin kundi fara í gongd, varð talan um eina seinking av byggingini uppá eitt hálvt til eitt heilt ár, men av tí at arbeiðið sambært fyriskriftunum skal verða liðugt, áðrenn bygningurin kann takast í nýtslu, valdi skipasmiðjan heldur at byrja byggingina, og síðan arbeiða við umhvørvislýsingini, soleiðis at henda kann verða liðug, tá bygningurin verður liðugur væntandi um ársskiftið. Hetta er alt í trá við fyriskriftirnar og tey loyvi, sum eru givin.

Sum eitt av størstu arbeiðsplássum í Havnini gjøgnum nógv ár, kennir skipasmiðjan tað sum sína skyldu og ábyrgd at ganga á odda, tá um trygd, umhvørivs- og arbeiðaravernd ræður, og verða tí alsamt gjørdar stórar íløgur í útbúnað, sum kann tryggja eitt høgt støði hesum viðvíkjandi. Skipasmiðjan roynir soleiðis altíð á besta hátt og sambært fyriskriftunum at tryggja, at dálking orsaka av virksemi á skipasmiðjuni, verður sum minst.

Tórshavnar Skipasmiðja hevur tí ongar ætlanir um at sleppa sær undan teimum krøvum sum eru galdandi á økinum, men hevur einans valt at »optimera« tíðarnýtsluna, við at lata bygging og umhvørvisarbeiðið fylgjast, soleiðis at komið verður á mál ís enn, tí givið er tað, at málið um umhvørvisgóðkenningina av nýggja bygninginum og umhvørvislýsingin av skipasmiðjuni sum heild eru heilt hvør sítt mál, sum tískil væl kunnu koyrast parallelt.

Samanumtikið metir skipasmiðjan seg tí ikki hava gjørt nakað skeivt, men hevur heldur hinvegin valt eina »praktiska« loysn á einum »teoretiskum« trupulleika.

*Tórshavn tann 27. juni 2002*

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
**Gunnar Mohr**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Teir eldru fara umborð á smærru skipini




**Lønarhækkanin hjá yvirmonnunum á Strandfaraskipum Landsins sæst ikki aftur á umsøkjaratalinum, nú søkt hevur verið eftir stýrimanni til Strandfaraskipið Barsskor. Tað eru fyri tað mesta teir eldru, ið søkja størv umborð á smærru skipunum, sigur starvsfólkaleiðari**

STRANDFERÐSLAN
*Rúnar Reistrup*

Mánadagin í hesi vikuni var seinasta freist at søkja starvið sum stýrimaður umborð á Strandfaraskipinum Barsskor. Og hóast Skipara- og Navigatørfelagið eftir tógvið stríð í vár tryggjaði sínum limum í starvi hjá Strandfaraskipum Landsins betri lønarkor, eru bara heilt fáar umsóknir komnar inn.

Páll Heinesen, starvsfólkaleiðari á Strand-faraskipum Landsins, upplýsir, at inn eru komnar einar 3-4 umsóknir til starvið, og at hetta er vanlig nøgd, tá talan er um størv umborð á smærru Strandfaraskipunum.

- Tey smáu skipini hava ikki tann stóra áhugan. Tá vit søkja eftir fólki til eitt av størru Strandfaraskipunum eru umsøkjararnir væl fleiri í tali, onkuntíð heilt upp til einar 15-20, sigur starvsfólkaleiðarin.

#### Áhugin ikki vaksin

Lønarhækkanin hjá yvirmonnunum umborð á Strandfaraskipum Landsins, sum Fíggjarmálastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag komu ásamt um í vár, hevur soleiðis ikki vaksið merkisvert um áhugan fyri at søkja starv hjá Strandfaraskipum Landsins. Í hvussu er ikki tá talan er um størv umborð á smærru skipunum, men Páll Heinesen, starvsfólkaleiðari metir, at nýggju sáttmálaviðurskiftini møguliga hava vaksið um áhugan at søkja størv við størru skipunum, har lønirnar betraðust lutfalsliga meira. Strandfaraskip Landsins hava tó ikki søkt eftir fólki til størru skipini, síðan nýggi sáttmálin kom í gildi.

#### Komnir upp í árini

Tað eru ikki teir nýklæktu skipararnir, sum søkja starv við smærru Strandfaraskipunum.

- Umsøkjararnir til starvið liggja allir í 50'unum. Tað er vanliga menn , sum eru komnir eitt sindur upp í árini, ið søkja størvini. Hesir hava oftast verið við fiski- og farmaskipum frammanundan og vilja nú royna okkurt annað, sigur Páll Heinsen, starvsfólkaleiðari á Strandfaraskipum Landsins.

Fráfarandi stýrimaðurin umborð á Barsskor fer frá fyri aldur.

## Koppel í Meirarínum

JAZZFESTIVALUR
*Rúnar Reistrup*

Meðan mest kenda navnið á skránni hjá Jazzfestivalinum í kvøld uttan iva er Stig Rossen, so stendur navnið Benjamin Koppel eisini skrivað við rættiliga tjúkkum bókstavum í tónleikaheiminum.

Sonur Anders Koppel, kendur úr millum øðrum Savage Rose, og abbasonur navnframa lagsmiðin Herman Koppel, hevur saxofonleikarin ikki sínar gávur frá ongum. Benjamin Koppel hevur rættiliga gjørt vart við seg á jazzpallinum, bæði í Danmark og uttanlands.

Í kvøld spælir bólkurin Benjamin Koppel Kvartet í Meirarínum. Konsertin byrjar 21.30. Hetta er einasta konsertin hjá bólkinum á Jazzfestivalinum.

Í gjár spældi saxofonleikarin sjálvur eina konsert í Klæmintsgjógv í Hesti.

# Tingformaður til Isle of Man

**Í gjár fór Edmund Joensen, tingformaður, við konu síni, Edfríð, til Isle of Man at vera við í hátíðarhaldinum á tynwald degnum, sum verður fríggjadagin 5. juli**

HÁTÍÐARHALD
*Rúnar Reistrup*

Í gjár fóru Edmund Joensen, tingformaður, og kona hansara, Edfríð, til Isle of Man á almenna vitjan í sambandi við, at parlamentið á Man, tað sonevnda tynwald, verður sett.

Tað hevur verið vanligt seinastu árini, at Isle of Man hevur bjóðað tingformanni við konu til hátíðarhaldið á tynwald degnum.

Tynwald dagurin er tjóðardagur á Isle of Man og kann í á mangan hátt samanberast við føroysku ólavssøkuna. Hendan dagin hátíðarhalda fólk at tingið verður sett á sama stað, sum tað hevur verið sett í meira enn túsund ár.

Umframt føroyska tingformannin og konu hansara vera eisini almennir gestir úr fleiri av hinum norðurlondunum til staðar á tynwald degnum, harímillum norski stórtingformaðurin Jørgen Kosmo.

Edmund Joensen, tingformaður, fer á vitjan síni at bjóða formanninum fyri tynwald til Føroya á ólavsøku.



*Í gjár fór Edmund Joensen við flogfari til Isle of Man, har hann er almennur gestur undir hátíðarhaldinum av tynwald degnum*